Fiskavirkið í Gøtu
Postrúm 29
FO-510 GØTA

Tórshavn, hin 31. juli 2002
Málnr.: 613-200100533-11
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: EE / Tlf.: 35 64 20

# UMHVØRVISGÓÐKENNING
# AV
# VIRKINUM HJÁ
# P/F FISKAVIRKIÐ Í GØTU

1 Góðkenning ... 2
2 Umsóknin ... 2
2.1 Av viðkomandi tekningum eru: ... 2
3 Lýsing av virkinum ... 2
4 Málsviðgerð ... 3
5 Góðkenningartreytir ... 3
5.1 Innrætting og rakstur ... 3
5.2 Óljóð og ljós ... 3
5.3 Luftútleiðing ... 4
5.4 Vatn og spillvatn ... 4
5.5 Kemikaliugoymsla ... 4
5.6 Burturkast ... 4
5.7 Óhapp ... 4
5.8 Innaneftirlit ... 4
5.9 Rakstrarskráseting ... 5
6 Almennar treytir ... 5
7 Kæruvegleiðing ... 6

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: feagency@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

# 1 Góðkenning

Við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann veita umhvørvisgóðkenning til virkið hjá Fiskavirkið í Gøtu.

Umhvørvisgóðkenning verður givin við teimum treytum, sum eru lýstar í partinum um "Góðkenningartreytir" niðanfyri.

Formateret: Punktopstilling

# 2 Umsóknin

Heilsufrøðiliga starvsstovan fekk tann 22. mars 2002 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá P/F Fiskavirkið í Gøtu.

Saman við umsóknini og seinni eru móttiknar tekniskar upplýsingar um virkið, útleiðingar og framleiðslu, upplýsingar um tíðarætlanir og vørulýsingar av evnum, sum virkið nýtir.

Formateret: Punktopstilling

## 2.1 Av viðkomandi tekningum eru:

2.1.1 Kort við matrikkulering yvir økið.
2.1.2 Støðuplanur, ið vísir, hvussu virkið liggur í umhvørvinum.
2.1.3 Yvirlit yvir útbúnað.
2.1.4 Rúmyvirlit.
2.1.5 Kort yvir byggiøki sambært byggisamtykt hjá Gøtu kommunu.
2.1.6 Kloakkplanur.
2.1.7 Tekning av spillvatnsútleiðing.
2.1.8 Uppstaltur og skurður av bygningi.

Eitt uppskot til umhvørvisgóðkenning var sent felagnum og kommununi til viðmerkingar 4. juni 2002. Ongar viðmerkingar vóru.

Formateret: Punktopstilling

# 3 Lýsing av virkinum

Virkið er staðsett á matr. nr. 106a, 106c og 188b á kaiøkinum í Norðragøtu (sí tekning nr.: 12301 í umsóknini, HS málnr. : 200100533-3).
Virkið framleiðir saltað fløk; saltaðan, flaktan fisk; ísað fløk; heilan/skráskornan fisk; lakasaltaðar kjálkar og lippur; heil, ísað høvd; ísaðan laks; frystan laks; ísað síl; fryst síl; súrløgu og slógv.
Rávøran er laksur, síl, toskur, brosma, longa, upsi og kongafiskur.

Ein gjøllari lýsing av virkinum og av umhvørvisviðurskiftunum er at finna í fylgiskjali 1 (HS málnr.: 200100533-10).

Formateret: Punktopstilling

# 4 Málsviðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á hesi viðurskifti:

- At útleiðingin av framleiðsluspillvatni verður hildin innanfyri mørk, sum eru mett at vera umhvørvisliga trygg.

Formateret: Punktopstilling

# 5 Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av hesum ásetingum:

Formateret: Punktopstilling

## 5.1 Innrætting og rakstur

5.1.1 Virkið skal verða staðsett og rikið soleiðis, sum sagt er frá í fylgiskjali 1 (HS málnr.: 200100533-10).

5.1.2 Eftir at virkið er liðugt umvælt, skal alt burturkast frá arbeiðinum burturbeinast í samsvari við galdandi kunngerð um burturkast, og økið rundan um virkið skal hampast.

5.1.3 Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga avmerkt.

5.1.4 Virkið skal rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar altíð verða hildnar.

5.1.5 Undir arbeiði, har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

5.1.6 Nýtslan av klori skal vera minst møgulig.

5.1.7 Virkið skal arbeiða fram ímóti meiri umhvørvisvinarligum sóttreinsingarhátti av spillvatninum.

## 5.2 Óljóð og ljós

5.2.1 Raksturin á staðnum má ikki hava við sær, at óljóðstøðið, ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A), fer upp um niðanfyri standandi mørk máld við næsta grannamark. Í krøvunum veldst tað um, hvat økini rundan um verða nýtt til.

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán. – frí. | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygar. | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán - frí. | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygar. | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

5.2.2 Tað hægst loyvda óljóðstøðið frá virkinum í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um tey nevndu markvirðini á nevndu økjunum.

Formateret: Punktopstilling

5.2.3 Nýtsla av ljósum skal vera soleiðis, at hetta ikki hevur við sær ampa.

## 5.3 Luftútleiðing

5.3.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær lukt- ella dustampar í nærumhvørvinum.
5.3.2 Um ampar verða av lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.
5.3.3 Skorsteinsútleiðingin skal verða sambært galdandi byggilóggávu.

## 5.4 Vatn og spillvatn

5.4.1 Virkið skal seta vatnmátara upp, sum mátar vatnnýtsluna hjá virkinum.
5.4.2 Alt spillvatn frá framleiðsluni og frá vaski av virkinum skal leiðast í lokaðari kloakkskipan út um brimgarðin og út á streymasjógv.
5.4.3 Munnin á útleiðingini má ikki vera sjónligur í lægstu fjøru.
5.4.4 Áðrenn spillvatnið verður leitt út, skal tað leiðast gjøgnum ein passandi dimensjoneraðan feittskiljara, so at ásettu markvirðir fyri spillvatn kunnu haldast, sí punkt 4.8.7.
5.4.5 Feittskiljarin skal hava sjálvvirkandi flotlæsara og ávaringarskipan, ið boðar frá, tá hann skal tømast.
5.4.6 Feittskiljari skal tømast eftir tørvi, men í minsta lagi eina ferð um mánaðin.
5.4.7 Eftir feittskiljaran skal vera ein sýnistøkubrunnur.
5.4.8 Spillvatnið í sýnistøkubrunninum má ikki bera brá av feitti ella olju.

## 5.5 Kemikaliugoymsla

5.5.1 Goymslan skal vera vard ímóti vindi og regni.
5.5.2 Undir goymsluni av kemikalium skal vera kar til at taka ímóti møguligum lekum ella spilli.
5.5.3 Rúmdin á karinum skal vera størri enn rúmdin á størsta kemikaliuílatinum.

## 5.6 Burturkast

5.6.1 Alt húsarhalds- og virkisburturkast skal viðgerast í tráð við galdandi reglur um burturkast, so sum kunngerð um burturkast.
5.6.2 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og tað skal skiljast sundur sambært galdandi reglum hjá móttakara.

## 5.7 Óhapp

5.7.1 Henda óhapp, sum hava dálking við sær, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk, so sum uppruddin, avmarking og fyribyrging, til eitt støði, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka. Boðast skal frá til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni beinanvegin.

## 5.8 Innaneftirlit

5.8.1 Sum innaneftirlit skal P/F Fiskavirkið taka 4 sýni av spillvatninum um árið. Sýnini skulu takast javnt býtt yvir alt árið. Sýnini skulu takast úr sýnistøkubrunninum hjá virkinum.
5.8.2 P/F Fiskavirkið skal gera kanningar av botninum nærhendis spillvatnsútleiðingina 1 ferð um árið. Kanningin skal gerast í august/september.
5.8.3 Títtleikin av sýnistøkum kann verða broyttur av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
5.8.4 Allar sýnistøkur og kanningar skulu gerast av starvsstovu, sum er góðkend av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
5.8.5 Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av virkinum.
5.8.6 Virkið skal lata gera kanningar av spillvatninum, fyrstu ferð innan 2 mánaðir aftaná, at

góðkenningin er givin.

5.8.7 Spillvatnið skal yvirhalda hesi markvirðini:

| Evni | Markvirði | Kanningarháttur |
|---|---|---|
| Olja (mineral) | Max. 10 mg/l | DS/R 208 |
| Olja/feitt | Max. 50 mg/l | DS/R 208 |
| Botnfelliligt evni | Max. 10 ml/l | DS 233 |
| Suspenderað evni | Max. 300 mg/l | DS 207 |
| PH | min. 6,5 – max. 9,0 | Elektrodur og/ella samanhangandi máting |

5.8.8 Sýnini frá kanningunum av botninum nærhendis spillvatnsútleiðingina skulu kannast fyri gløðitap, pH, redoxpotentiali, innihald av total-fosfor og total- nitrogen. Sýnini skulu lýsast kvalitativt við atliti til fauna, sedimenttjúkd, lukt, lit, konsistens og um blørur síggjast.

Formateret: Punktopstilling

5.8.9 Víðkað kanningarskrá kann í serligum føri verða umbiðin av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

### 5.9 Rakstrarskráseting

5.9.1 Virkið skal føra rakstrarbók, ið skal innihalda fylgjandi upplýsingar:

a. Framleiðslunøgdir, útgreinað eftir slagi.
b. Nøgdir av allari brúktari ráværu; tað er fiskur til framleiðsluna, tilsetingarevni, reingerðarevni og sóttreinsingarevni.
c. Nøgdir av slógvi, útgreinað eftir, hvar tað kemur frá, hvørja viðgerð tað fær, og hvør keyparin er.
d. Vatnnýtsla og orkunýtsla.
e. Avhendaðar nøgdir av burturkasti, til brenning, tyrving ella endurnýtslu, og móttakari.
f. Nøgd og slag av vandamiklum burturkasti (olju- og kemikaliuburturkast) og móttakari.
g. Avhendaðar feittnøgdir úr feittskiljara og móttakari.
h. Úrslitini av spillvatnsgreiningum.
i. Úrslit av botnkanning.
j. Rakstraróhapp, ið kunnu ávirka umhvørvisviðurskiftini, og møgulig orsøk.
k. Frágreiðing við atlit til punkt 4.1.6 og 4.1.7.

Formateret: Punktopstilling

5.9.2 Rakstrarbókin skal vera á staðnum, og eftirlitsmyndugleikin skal kunna síggja hana eftir umbøn. Bókin skal goymast í 5 ár.

5.9.3 Avrit av rakstrarskrásetingunum skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

## 6 Almennar treytir

Virkið hevur skyldu til at fylgja grundregluni um at minka um nýtsluna av tilfeingi, dálking og útlát mest møguligt, uttan so, at tað viðførir órímiligan kostnað.

Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Heilsufrøðiliga starvsstovan kann broyta eftirlitstreytirnar, um hildið verður, at hetta er neyðugt fyri at fremja eitt munadyggari eftirlit.

Eitt eintak av hesi góðkenning skal altíð vera tøkt á virkinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.

Annað umhvørvistyngjandi virksemi enn tað, sum er lýst í umsóknini, má ikki fara fram. Um ivamál taka seg upp, ger myndugleikin av, hvat umhvørvistyngjandi virksemi er.

Í 5 ár eftir góðkenningina kann bert verða givið boð ella forboð, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

Formateret: Punktopstilling

## 7 Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til Føroya landstýri. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir kæruna til Føroya landsstýri við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Avrit:** Arbeiðseftirlitið, Postrúm 1134, FO-100 Tórshavn
Føroya landsstýri, Vinnumálastýrið, Postrúm 377, FO-100 Tórshavn
Føroya landfúti, Postrúm 3018, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn
Landsdjóralæknin, Postrúm 139, Tinganes, FO-110 Tórshavn
Gøtu kommuna, FO-510 Gøta.